# Stendur kommunala frælsið fyri falli?

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



Í sambandi við íverksetan av roknskaparkunngerð heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tað vera neyðugt at íverkseta nýtt “Watergate”. Hesa ferð kávar hann helst útyvir, ella flytur hann bara fokus, frá teimum trupulleikum, ið landskassin og harvið landsstýrið hevur við ovurstórum rakstrarundirskoti.

Eg kundi hugsað mær at vitað, um løgmaður og hini landsstýrisfólkini taka undir við hansara ódámligu tekning av kommunalu fíggjarviðurskiftunum, fyri á tann hátt at rættvísgera neyvari stýring av kommununum, og við hansara grovu ákærum um, at kommunurnar í uppgerðum og roknskapum hava “fjalt virksemi”, so ikki ber til at síggja, hvussu veruliga kommunala virksemið sær út, og hvussu stór skuldin, ið kommunur hefta beinleiðis fyri, er.

Tá ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum brúkar vendingina "fjalt virksemi", so fáa fólk ta fatan, at kommunurnar seta til viks reglur og lógir - at tær tilvitað bróta lógina við kreativum loysnum.

Hetta er ein sera álvarsom ákæra. Allar kommunalar útreiðslur ganga fram í roknskapunum. Sjálvsognarstovnar hava egnar roknskapir, men útreiðslurnar, sum kommunan hevur, eitt nú til løn til pedagogar, stuðul til lán og íløgur v.m., síggjast í kommunala roknskapinum.

Nei, her er einki fjalt - og eingin lóg er brotin, tað vildi heldur eingin ríkisgóðkendur grannskoðari havt góðkent.

Í tíðindunum leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kommunurnar undir at hava 300 mió kr. í halli, áðrenn roknskapir fyri 2008 yvirhøvur eru latnir inn, men kanska hevur hann tølini úr fíggjarætlanunum frá desember í 2007, og um so er, ivist eg stórliga í samfelagsvirðinum av kommunala eftirlitinum!

At nakrar kommunur hava mett sínar inntøkur ov høgt, er kanska nakað, landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eigur at hava eyguni við, samstundis sum hann eigur at bøta um atgongd kommununnar til eftirfarandi tøl frá TAKS, tá um inntøkur ræður. Kommunur hava eisini minkað um ætlaðu íløgurnar, eins og fleiri hava sett tiltøk í verk fyri at tálma rakstrarútreiðslunum, nú búskaparvøkstrinum sær út til at minka.

Sambært TAKS er persónsskattainntøkan fyrstu 9 mánaðirnar í ár 998 mió kr. Kommunurnar hava mett skattainntøkuna í 2008 til 1,367 mia. Afturat hesum kemur kommunali parturin av partafelagsskattinum. Hetta eru sjálvandi heildartøl.

Staðfestast kann, at samlaði kommunali búskapurin stendur ikki fyri nøkrum hóttafalli - og kommunali búskapurin fer heldur ikki at máa støðið undan samlaða almenna búskapinum, so sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vil hava tað at ljóða. Her hava kommunurnar fíggjarstýrt við skili.

Eitt parametur í tí sambandi er kommunuskuldin. Um allar kommunur høvdu skuld svarandi til eina álíkning, so var skuldin 1,4 mia. Tórshavnar kommuna fyllir nærum helvtina av kommunala búskapinum, og sum kunnugt hevur Tórshavnar kommuna - við ella uttan Tórshavnar Havn - ikki skuld av týdningi fyri samlaða kommunala búskapin. Óansæð, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum roynir at tekna eina aðra mynd við at vísa til “fjalt”, ja, hálvavegna kriminelt virksemi, so er samlaða kommunuskuldin ikki trupulleikin.

Landsstýrið hevur sett sær sum mál at reka almennan búskaparpolitikk, og tí er neyðugt at hava neyvt "yvirlit" við kommunala búskapinum, verður sagt. Frá "yvirliti" til "eftirlit" og víðari til "stýring" er sera stutt. Yvirlit er nakað, man fær sær, eftirlit er álagt, meðan stýring er beinleiðis politikkur.

Kommunustýrislógin gevur kommunum frælsi, men við felags fíggjarkørmum millum land og kommunur, eins og við ítøkiligari lóggávu, tekur landið innaftur hetta frælsið - til at stýra almenna búskapinum, verður sagt. Hetta er tó ikki allur sannleikin, og tí er tað í veruleikanum kommunala sjálvræðið, ið stendur fyri hóttafalli, ikki búskapurin.

Tí tá ið fremsta fyrimyndin er danska kommunala skipanin við fastløgdum karmum bæði um rakstur, íløgur og skattaprosent, javning, blokkstuðul og smálutastýring við revsimekanismum, so er kommunala sjálvræðið bert eitt eiti.

Eg kann at enda vísa á, at vit tíanverri enn ganga fremst, tá umrøður at herma. Tá síðsta kopi av roknskaparreglum fyri kommunur varð sett í verk, var upprunalandið Danmark tíanverri farið frá hesari skipan, tí hon var ónýtilig, men henda er galdandi til nýggjárs.

Eg skal vera hin fyrsti at heilsa einari tiltrongdari roknskaparreglugerð vælkomnari, men eg finni meg ikki í slíkari dálking frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Um eg bað landsstýrið sópa fyri egnari hurð, kundi eg víst á uppgávubýtið frá ár 2000, tá land og kommuna stóðu við tveimum felags órøktum økjum, nevniliga barnaansingar- og eldraøkinum. Kommunurnar átóku sær at fáa skil á barnaansingarøkið. Føroya fólk kann sjálvt siga sína hugsan um eldraøkið og hvussu har stendur til!

Í Danmark hevur tað eydnast forsætisráðharranum at taka stig til at tálma framferðarháttinum hjá ríkisstjórnini móti kommununum, millum fólk nevnt “cirkulæreterror”. Men nú er hesin sami framferðarháttur nýfunnið vápn í amboðskassanum hjá okkara fíggjarmálaráðharra.

Tí heiti eg á landsstýrismannin í fíggjarmálum um at taka mótmælið hjá Kommunusamskipan Føroya til eftirtektar og aftur at finna fram til viljan um felags stev og felags mál, tá umrøður roknskaparverk kommunanna.

Eg bíði framvegis eftir umbidna fundinum við landstýrismannin í fíggjarmálum um hetta álvarsmál.

# Hvat bjóða vit framtíð okkara, gávu okkara?

UNN HENTZE
valevnið Miðflokksins til kommunuvalið



Hugtøk sum børnini eru framtíðin og børn eru gáva Guds, eru hugtøk sum eg fult kann taka undir við.

Í hesum døgum verða vit í heilum gjørd varug við, hvussu týðandi tað er at liva sunt, hettar er ikki bert galdandi fyri vaksin. Grundarlagið fyri sunnu vanum verður lagt í barndóminum. Tí vil eg, um eg verið vald, m. a. arbeiða fyri at øll børn í Tórshavnar kommunu fáa frukt, grønt og mjólk í skúlanum.

Eg veit, at hettar hevur verið roynt áður, men í alt ov stutta tíð. Givist varð við hesum, tí børnini ikki ótu fruktina og varð hon tí koyrd vekk. Góvu vit børnunum møguleika til at venja seg til fruktina? Tað tekur tíð at broyta vanar, og eg meini ikki vit góvu børnunum nóg langa tíð, at venja seg við fruktina.

Eg fari ikki at siga, at Pisakanningin gekk illa, orsaka av at tað vóru ósunn børn, ið vórðu kannaði, men hettar kann hava verið viðvirkandi. Kanningar vísa, at ein sunnur lívstílur hevur ávirkan á innlæring og aðrar kanningar vísa, at nógv børn liva alt ov ósunt.

Eitt annað íð eg vil arbeiða fyri, er tíðin børnini kunnu ganga í frítíðarskúla. Stitandi býráð hevur syrgt fyri at tey kunnu ganga í frítíðarskúla í 2. flokki og hettar er gott, men eg meini at tey hava brúk fyri, at verða har í í hvussu er í 3. flokki eisini. Í 3. flokki eru tey uml. 9 ára gomul. Foreldrini arbeiða, børnini fáa frí, hvar skulu tey fara? Tey eru, eftir míni meting alt ov ung til at ganga einsamøll runt í Havnargøtum, ella sita einsamøll heima frammanfyri sjónvarpinum. Tí meini eg at børn eiga at fáa tilboðið, at kunna ganga í frítíðarskúla til tey eru í 3. ella 4 flokki.

Eisini vil eg gera mítt til at eftirlit og dagføring við hølum/byggningum har frítíðarskúlanir halda til, verður framt. Hettar skal forrestin eisini galda skúlarnir.

Havnar kommuna er ein hin ríkasta kommunan í landinum, hóast hettar, so lækkar játtanin til skúlar (bøkur og telduforit) í 2009. Hví? Hvat skal kommunan brúka hesar pengarnir til? Hvat er meira týðandi at brúka teir til, enn at geva okkara børnum eina góða skúlagongd? Tað verður í seinasta end eitt aktiv fyri samfelagið.

# Listarligt tilfeingi

CHARLOTTA Á VÁLI OLSEN
valevni Miðfloksins til býráðsvalið



Onki land í heiminum er so ríkt við listarliga gávuríkum talentum sum Føroyar í mun til fólkatalið! Ikki minst innan tónleikin!

Føroyingar hava gjørt seg galdandi so at siga innan allar ’sjangrir’ einsamallir ella í bólkum bæði her heima, men so sanniliga eisini uttanlands. Fleiri hava dystast í finalum – og vunnið! Onnur hava verið í klassiskum kappingum, har fleiri hava fingið ’útmerkilsi’ heim við. Hetta vísir okkum, at vit hava eitt sera stórt potentiali innan okkara mentan, sum vit eiga at geva gætur.

Í Tórshavnar Kommunu eru umstøðurnar hjá musikkskúlanum so ringar, at vit skammast!

Í Býráðnum má prioriterast við pengunum, sjálvandi, men vit hava sæð, hvar sitandi býráð prioriterar, tó øll skulu hava sítt, men – vit kunnu ikki lata sita á okkum, at okkara uppvaksandi ættarlið verður forðað í at menna sínar listarligu talentir, tí sitandi býráð ikki vil prioritera tað!

Nei, vit mugu taka annað skinn um bak og síggja virði í hesum tilfeingi!

Eg vil arbeiða við hond og fót fyri at fáa ein dagførdan musikkskúla á breddan skjótast møguligt!

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

† 

## Andlát og jarðarferðir

**Søren Urnhamar, Vágur**, ættaður av Viðareiði, andaðist í eldrasambýlinum í Vági týsnáttina, 86 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Bethel fríggjadagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Søren, kunnu lata eldrasambýlinum í Vági eina gávu.

Lítla **Tordis Beder Jónsdóttir**, dóttir Herdis og Jón Simonsen í Fuglafirði andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 21. oktober. Jarðarferðin verður úr Fuglafjarðar kirkju fríggjadagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Tordis kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik.

**Sigga Maria Debes**, fødd Egholm, ættað úr Hvalvík, búsitandi í Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 88 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju leygardagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Siggu, kunna lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu, konta í peningastovnunum.

Kistan við **Dagny Petersen úr Sørvági** fer úr Landsjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Zarepta fríggjadagin klokkan 14.00. Tey, ið vilja minnast Dagny kunnu lata eina peningagávu til AKURIN. Konta í peningastovnunum.

**Dagurin**

**24. august. Bartalsmessa ella bartalsøka**. Til minnis um lærusveinin Bartolomeus. Halgisøgan sigur, at tá ið ápostlarnir skiltust, fór hann eystureftir til Armeniu, Mesopotamiu og Indiu, har hann varð tikin av døgum av uppøstum avgudaprestum. Í træskurðinum á einum av kirkjubøstólunum sæst hann við kvívi í hendi, ið sipar til, at hann varð flettur livandi. Navnið merkir sonur Ptolemeusar.